# Vár í øskuni



STUTTSØGA

*Eftir Zakariyya Tamer*
*Týtt hevur Jóhan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Í gamlari tíð var ein lítil býur, ið var bygdur millum grønar markir, sum ein á, ið gav ríkiliga nógv av vatni. Fólkini í býnum gingu øll við lepum av tjúkkum pappíri í teirra lummum, har á var skrivað eitt navn av nøvnum.

Fólkið var blandað rík og fátæk. Og tey ríku vóru mentað og dámlig. Tey gingu við hvítum sløri og í skínandi skógvum. Tey dugdu at dansa og siga fínar søgur. Tey bukkaðu kurteisliga og kystu hendurnar hjá kvinnunum. Teirra børn róptu tíðum á teirra mammur í løttum tónalagi: "Ma-ma!"

Tey fátæku flentu ófantaliga í lukkuligum løtum. Tey savnaðu spýttið, og tey trúðu, at tey sum gestir kundu at seta búgv. Tey róptu á mammu teirra við eini hásari og toygdari rødd: "Maamma!"

Tey ríku og fátæku virdu tann deyða sera nógv. Tá eitt gravarfylgi kom framvið, steðgaðu tey á, ímeðan sorgin og óttin lýstu í teirra eygum. Nøkur av teimum hjálptu til við at bera ókenda deyða líkið ein ikki so stuttan tein. Eina løtu lótu tey teirra munnar upp fyri at gera nyttu av fyrsta bitanum av teirra mati. Tey vóru saman um at siga við lýdni: "Í navni Guds hins náðifulla og miskunnsama." Og sama tá ið máltíðin var at enda komin: "Lovaður verið Gud, harri yvir heiminum!"

Tá ein genta í býnum gjørdi eitthvørt skeivt, varð hennara høvd høgt av hennara kroppi, uttan blunkan, við einum knívi við stórum blaði.

Arbeiðararnir arbeiddu átta tímar um dagin. Og elskararnir møttust í loyndum í myrkrinum í biografhølunum, har umfevndust hendurnar í litinskapi.

Aftur og aftur góvu læknarnir góð og væl meint ráð: "Haldið tykkum frá sigarettunum og víninum."

Teir gomlu ristu høvur teirra dapurt og í sorg, meðan teir mutlaðu: "Forfallið spreiðir seg... Kvinnan gongur í buksum... Sonurin virðir ikki faðir sín... Hetta eru tekini, ið boða frá endanum á lívinum her á jørð."

Vinirnir práta, tá teir møtast við dagsins byrjan: "Góðan morgun!"

Og yvir hesum býnum var, hóast at hann var lítil, ein sól, sum reis á einari ávísari stund, síðan setti hon somuleiðis eina ávísa stund. Og eisini var ein nátt, ið var fríðkað við fleiri stjørnum, sum bergtóku, tá tann hvíti mánin kom fram.

Ein maður, sum hevði eitt ella annað navn, búði í hesum býnum. Andlit hansara var ein skøltur, á hvørs beinum hekk bleik og rak húð. Hann hevði eitt inniligt ynski um at vera ein blóma ella ein smáfuglur ella eitt skýggj, sum elskaði at ferðast. Og sorgin megnaði ikki at sigra á honum, hóast hann visti, at hann ikki kundi verða ein blóma ella ein smáfuglur og ei heldur eitt skýggj, sum elskaði at ferðast. Men hann var troyttur av at liva einsamallur í sínum tóma og friðarliga bústaði. So hann gjørdi av í eini gráari løtu av løtum at keypa eina kvinnu. Kvinnan kundi kanska vera saman við honum og við hennara rødd oyðileggja tann kleprandi rustin, sum festi seg á hansara dagar. Maðurin gekk beina leið til trælkvinnumarknaðin og valdi eina kvinnu við tveimum stórum eygum, í hvørs dýpum hann kundi gráta eina sorg, ið var blandað við tí gátuføru sterku

**Arabiskt**

Arabiski heimurin hevur eitt felagsskriftmál. So, sjálvt um talaða málið skiftir frá landi til lands, millum býir, bygdir og oyðimarkirnar, eins og t.d. íslendskt, føroyskt og norskt gera, so er skriftmálið tað sama. Tó, undantikið Algeria og í minni mun Tunesia og Marokko, har franskt dominerar. Sostatt kann ein irakiskur høvundur verða lisin á jøvnum føti av libanesarum, egyptum og jemenittum og umvent.

Arabiska málið hoyrir til ta semitisku málsfamiljuna og er eisini málið í muslimsku skriftini í Koranini. Í miðeystri práta meiri enn 150 milliónir arabiskt, men nógv fleiri skilja skriftmálið, hetta eru útbúgvin muslimar.



sjarmuni. Maðurin rindaði fyri hana og hann segði við seg sjálvan: "Kanska er tað møguligt hjá henni at drepa tey grátandi tindasvínini í mínum blóði."

Maðurin segði ikki eitt orð við konuna meðan tey gingu túr á gøtuni. Men, tá tey bæði komu til húsið, spurdi hann hana: "Hvussu eitur tú?"

So svaraði kvinnan eftir eina løtu við eini spakari og mildari skelvandi rødd: "Eg eiti Nada."

Maðurin var sitandi við síðuna av kvinnuni, tær slitnu hendurnar lógu á hansara knøum, tær ristust - vilt blóð brúsaði í æðrunum á teimum. Í hesi løtu ynskti hann sær kvinnuna nakna á eini sandstrond, meðan hon møtti bláa havinum, í tí at tess heita og saltaða vatn kýndi hennara bróst. Hann segði í einum ørkymlaðum tóna: "Úr hvørjum landi stavar tú?"

"Eg havi einki land."

Hann stardi eina løtu at henni, síðan segði hann: "Tú er vøkur."

Hennara muður var merkiliga dýriskur, lítil og skarlaksreyður. Fyri hansara eygum var muðurin tað einasta á gøtuni. Hann knýtti sínar fingrar saman. Ein harður skjálvti fór ígjøgnum hana, meðan hann róliga segði: "Títt navn er eisini vakurt."

Hon segði, meðan hon smíltist undarliga: "Mítt navn er veruliga Shahrasad". So rópti maðurin, í tí hon tók hann á bóli: "Er tú Shahrasad?"

Kvinnan segði: "Eg eri Shahrasad... Deyðin hevur ikki heystað meg... Shahariár doyði."

Maðurin segði: "Shahariár doyði ikki... Hann er enn livandi."

Kvinnan segði: "Áh, mín harri."

"Mítt kongaríki fall. Áh Shahrasad!"

"Vit vórðu atskild frá hvørjum øðrum!"

"Vit viltust yvir alla ta stóru jørð."

"Eg leitaði eftir tær allastaðni."

"Svongdin noyddi meg at gráta."

"Eg bleiv fongslað í einum rúmi, við læstum hurðum."

"Eg bleiv biddari."

"Eg gekk á gøtunum, eg var ballað inn í einum svørtum teppi."

"Eg gravaði í jørðini við neglunum."

"Eg livdi sum einsamøll kvinna í býum, har bara menn búðu."

"Tað bleiv spýtt í mítt andlit."

"Menn, ið áttu gull, keyptu meg."

"Eg eri ein neyðars maður. Hví fór tú frá mær? Áh Gud!"

"Áh, sum vit eru blivin revsað!"

"Áh, sum vit eru blivin revsaði!"

Tey umfevndust fast og grótu leingi. Maðurin teskaði við eini skelvandi rødd: "Eg elski teg... Eg elski teg!"

Hon hugdi at honum við eygum, ið vóru vát av tárum og har úr hon skríggjaði. Girndin spreiddi klórnar í kjøtið, hann slapp ikki undan henni. Hann legði seg hjá hennara kroppi við einum suffi. Skjótt var muður hansara á hennara munni. Men so komu skríggj av gøtuni til hansara oyru: "Fíggindarnir leypa á... Drepið!.. Drepið!.. Avstað í krígg!".

Trummubankanin gjørdist harðari og harðari við eini ræðandi og vreiðari rútmu. Maðurin kláraði ikki at láta sum um hann ikki hoyrdi hana. So hann fór frá hennara kroppi við einari álvarsligari rørslu, kvinnan skríggjaði biðjandi: "Far ikki frá mær!.. Far ikki í bardaga!.. Ver við mína lið!"

Maðurin segði: "Tig við tær!.. Smogurnar í býnum... Móðir mín kallar meg."

Hann tók sítt svørð, sum hekk á vegginum og kom í gøturnar, har menninir bardust í kvøldarmyrkinum.

Hann skundaði sær til miðjuna á stríðnum. Við svørði sínum høgdi hann í eina og hvørja bringu, ið kom fyri hann. Hann gleddi seg, hvørja ferð tað langa stálblaðið, við eini ræðuligari illsintari rørslu, gleið niður í bleyta kjøtið.

Tá stríðið var av, stóð maðurin stillur. Kroppurin var vátur av sveitta og blóði. Ein ógvusligur ófriður rakti hann, tá hann bleiv greiðir yvir, at hann var tann einasti maðurin eftir á lívi. Viðvíkjandi hinum monnunum, so lógu kroppar teirra spreiddir á asfaltsvegnum í bunkum av sundurskræddum kjøti. Hann fall niður á blóðigu jørðina og græt sáran, meðan hevði eldurin oytt húsini og tey falnu í býnum.

Maðurin steðgaði við at gráta eina løtu, eldurin nærkaðist. Hann skundaði sær og rýmdi út úr býnum, til tær fjarlagdu markirnar. Haðani hómaði hann býin, sum hevði broytt seg til ein stóran bunka av brennandi reyðum eldi í hjartanum á svørtu náttini. Hann fall niður á grønu jørðina og gav seg yvir í ein djúpan dreym. Hann hevði ikki vaknað, um ikki sólin hjá tí nýggja degnum reis.

Friðurin var yvir øllum støðum og býurin var ein stórur svartur klumpur, har roykurin stóð upp frá. Maðurin hoyrdi eina spakuliga grátandi rødd. Hansara eygu litu rundanum seg, royndu at finna okkurt, til tey fullu á eina unga gentu, sum var dottin á grøna lendið. Hann gekk yvir til hana og spurdi hana: "Hví grætir tú?"

"Býurin er brendur. Øll eru deyð."

"Íðan so er eingin eftir."

Gentan svaraði ikki og fór aftur at gráta. So spurdi hann hana aftur: "Hví grætur tú?"

Hon segði, í tí hon goymdi andlitið í lógvunum: "Eg eri svang."

Hann fór frá henni, fyri at leita eftir onkrum mati. Hann frøddist, tá hann fann eitt súreplatræ við tungum greinum, ið høvdu búnar fruktir. Hann skar nakrar niður og bar tær til gentuna. Hann stardi eftir henni, meðan hon dúgliga át súreplini.

Longsulin eftir at verða ein blóma ella ein smáfuglur ella eitt skýggj, ið dámdi at ferðast, vendi aftur.

Hann segði við seg sjálvan spyrjandi: "Er hennara navn Shahrasad?"

Hann turkaði andlitið á gentuni við einum stykki av hennara klæðum. Hon stardi at manninum við djúpum takksemi.

Hennara andlit var blítt. Og hann mintist hansara fyri langari tíð síðan farnu barndómsdagar. Hann segði við sorg: "Íðan, so eru tað bara vit eftir á lívi"

Gentan bleiv við at vera tigandi, uttan so mikið sum at hennara varrar lótu seg eitt lítið sindur upp. Maðurin sá eina reyða rósu, hann hentaði hana og smæðin gav hana henni, sum síðan tók ímóti við einum smædnum smíli. Hon vakti gleðina og fekk aftur og aftur æðrarnar í honum at syngja hansara vakrastu sangir.

Maðurin hjálpti gentuni upp, síðan gingu tey spakuliga ímóti deyða svarta býnum.

Brádliga hoyrdu tey ein smáfugl syngja. Tey steðgaðu, teirra eygu møttust í longum eygnakøstum. Tað var fyri manninum, sum um hann hoyrdi fjarløgd róp blandað við barnagráti.

Tey bæði gingu víðari og hildu hendurnar saman í kærleika og alski.

Fyri henni var sólin ung og lýsandi.

## Ein arabiskur høvundur: Zakariyya Tamer

Føddur í 1929 ella 1931 í Damaskus. Fór úr skúlanum, tá hann var 13 ár og arbeiddi sum smiðjur til 1960. Frá 1960 til 1981 var Tamer í starvi hjá mentanar- og samskiftismálaráðnum í Damaskus sum stjóri á sýrisku sjónvarps- og dramadeildini. Samstundis var hann næstformaður í Arabiska Rithøvundafelagnum í Damaskus og ritstjóri á ymiskum tíðarritum í stjórnarregi og uttanfyri. Í 1981 flutti hann til London, har hann helt fram sum høvundur fyri tíðindabløð. Seinasta verkið hjá honum kallast Súrar Drúur og kom út í 2000 í Beirut.

Men eftir arbeiðstíð gekk hann í kvøldskúla í bókmentalestri og byrjaði at skriva stuttsøgur og barnabøkur. Við lítlari og ongari formellari útbúgving etableraði hann seg við stuttsøgusøvnum sínum sum ein av best kendu eksponentunum av stuttsøgu-sjangruni í arabiska bókmentaheiminum og serliga í sýriskum bókmentahøpi. Hann er munavíst ókendur í Evropa, sjálvt um nakrar av hansara stuttsøgum eru týddar til spanskt, italskt, týskt og enskt.

Sum sjálvlærdur høvundur skrivar hann í einum eyðkendum og litføgrum stíli og hansara søgur eru ofta allegoriskar við politiskum yvirtónum. Hansara barnabøkur njóta eisini stóra viðgongd.

Tá ein lesir stuttsøgurnar hjá Tamer eru tvey fyribrigdi sum skara framúr. Fyrst er hansara málbrúk, ið skiftir frá sera myndatyngdum máli til heilt orðaknappar vendingar. Tað seinna er eitt afturvendandi tema: Kúgan. Tað harðrenda, sum t.d. morð, er eitt afturvendandi fyribrigdi í hansara søgum - ofta stendur lesarin spyrjandi yvirfyri meiningsloysinum, ið setir dám á søgugongdina.

Í The Modern Arabic Short Story frá 1997 lýsir bókmentafrøðingurin Sabry Hafez verkini hjá Tamer sum: "...lýriskar royndir í tí narrativu sjangruni, við tí endamáli at samskifta ta isolering og innatventheit sum Tamirsa ættarlið føldi."

Vár í øskuni er úr savninum við sama navni frá 1963. Tað er í 1950'unum, at realisman slær ígjøgnum í arabiska bókmentaheiminum og sum fleiri og fleiri lond gjørdust sjálvstýrandi, so vuksu framtíðarvónirnar um eitt vælvirkandi samfelag. Idealið fyri høvundarnar úr hesum ættarliðnum var samfelagsligur eldhugi. Men sum frá leið, og úrslitini ikki livdu upp til vónirnar um eitt betri samfelag, og samstundis við stóru kúgingina av vinstravendu politisku mótstandarunum, var samfelagið ein mótsetningsfylt tilvera at liva í. Hetta er sjónligt í fleiri av stuttsøgum Tamers.